Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Beinir Johannesen, løgtingsmaður

Svarari: Sirið Stenberg, landsstýrismaður í almanna- og mentamálum

Evni: Kringvarpsgjald hjá vinnufyritøkum

Spurningar:

1. Hvussu nógvar vinnufyritøkur gjalda kringvarpsgjald í dag?
2. Hvussu eru tær vinnufyritøkurnar býttar út frá § 7, stk. 3 í kringvarpslógini?
3. Hvør er upphæddin tilsamans, ið vinnufyritøkur gjalda í kringvarpsgjaldi?
4. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um broytingar viðvíkjandi kringvarpsgjaldinum hjá vinnufyritøkum?

Viðmerkingar:
Í 2015 bleiv kringvarpslógin broytt soleiðis, at vinnufeløg eisini skuldu gjalda kringvarpsgjald alt eftir, hvørjar lønarútreiðslurnar eru.

Fyrispurningurin verður settur fyri at fáa eina mynd av, hvussu nógvar vinnufyritøkur gjalda og hvussu nógv. Eisini verður fyrispurningurin settur fyri at fáa greiðu á, um landsstýrismaðurin hevur ætlanir um broytingar á økinum.

Á Løgtingi, 19. juni 2023

Beinir Johannesen